# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Virðistjak

Í gjár umrøddu vit her hugskotið hjá John Johannesen, formanni í tingbólki Javnaðarfloksins, um at fáa gomlu javnaðarvirðini aftur í hásætið. Orðaskifti hevur longu tikið seg upp her í blaðnum í og við, at tríggir navngivnir javnaðarmenn gera hvassar viðmerkingar til politisku kósina.

Javnaðarflokkurin hevur ilt í virðunum ella grundsjónarmiðunum. Hetta kemur ivaleyst av samstarvinum við borgarligar flokkar, eitt samstarv, ið krevur neyðsemjur, sum mangan ganga ímóti floksins grundsjónarmiðum. Hesa støðu kennir einhvør flokkur, og soleiðis vil tað framhaldandi vera, um ikki flokkur megnar at varðveita politiska samleikan i samstarvinum.

Javnaðarlokkurin er støðugt í tvístøðu, tí hann hevur tvey sett av grundsjónarmiðum at fyrihalda seg til, nevniliga ta sosialdemokratisku ideologina og ríkisfelagskapin. Hetta er ikki lætt hjá floksleiðslu og tingbólki ei heldur hjá fótfólkinum.

Tá neoliberalistisku og neokonservativu rákini skoluðu inn yvir europeiska meginlandið, komu allir europeiskir javnaðarflokkar undir trýst. Teir flestu skeittu eftir New Labour hjá Blair, sum uttan víðari leyp upp á vognin og tók upp nógv av tí politiska strandvarpi, sum var rikið upp eftir Reagan, Thatcher og George W. Bush. Fyri New Labour elvdi tað til eina politiska vanlukku, at flokkurin uttan víðari tók so nógv av hesum til sín.

Aðrir flokkar, t.d. tann spanski sosialdemokratiski flokkurin, valdu at halda fast við gomlu virðini, og hevur flokkurin bert vunnið við hesum. Norðurlendsku javnaðarflokkarnir hava roynt ideologiskt at halda tørn, men eru undir stórum trýsti av eitt nú spurninginum um innflytarar og flóttafólk. Frægast hevur gingist í Noregi. Xenofobiin ella fremmandaóttin er vaksandi m.a. orsakað av, at høgrapopulistiskir flokkar grovliga misnýta hetta mál. Sosialdemokratar og aðrir vinstrahallir flokkar eru í truplari støðu og hava hildið skiftandi kós í spurninginum um støðuna hjá innflytarum og flóttafólki.

Hartil kemur, at javnaðarflokkarnir ikki longur hava patent upp á vælferðarsamfelagið. Borgarligu flokkarnir hava flestallir góðtikið henda samfelagsmyndil, og er hetta sjálvsagt ein avbjóðing. Tað sama er hent hjá okkum, har allir flokkar upp undir val lova gull og grønar skógir.

Sum nevnt hevur føroyski Javnaðarflokkurin ein eykatrupulleika: ríkisfelagskapin, sum elvir til spjaðing í flokkinum. Tá tjóðskaparliga aldan ryggjar, kemur flokkurin undir trýst – tá aldan aftur leggur seg t.d. í krepputíðum, kemur Javnaðarflokkurin eisini undir trýst. Orsøkin man vera, at ivaleyst Tjóðveldi er betri til loysingina, og Sambandsflokkurin verður mettur at er betri til at tryggja sambandið. Javnaðarflokkurin er tí støðugt í vanda fyri at detta niður ímillum. Her eru sostatt nógv ymisk fyrilit, nógvir politiskir spurningar at taka støðu til í Javnaðarflokkinum, og orðaskifti kann bert gagna øllum pørtum. Vit fara her framhaldandi at koma við okkara íkasti og fara at viðgera Javnaðarflokkin eins sakliga og vit viðgera allar flokkar.

**Sosialurin**

## Jú, Javnaðarflokkurin hevur altíð verið trygdin fyri pensjónini - og soleiðis verður eisini hesaferð!

**HANS PAULI STRØM**
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin



Ongantíð síðan P. M. Damsa dagar hendu so stór framstig fyri pensjonistar sum hesi árini 2004-08, tá Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina av almanna- og heilsumálum. Men á heysti 2008 yvirtók Sambandsflokkurin við Rósu Samuelsen politisku ábyrgdina av pensjóns- og almannaøkinum annars. Síðani tá er bara gingið afturá á hesum økjum. Kortini hendir tað margháttliga, at fyri hetta verður Javnaðarflokkurin revsaður og Sambandsflokkurin upphevjaður í seinastu veljarakanningini.

**Javnaðarflokkurin legði rygg til pensjónshækkingarnar**

Tað var dýrtkeypta høvuðskravið hjá Javnaðarflokkinum í samgonguavtaluni við Sambands- og Fólkaflokkin í 2004, at fremja munandi hækkingar í pensjónunum. Og hetta gjørdist úrslitið eftir 4 árum:

- **Stakur pensjonistur:** úr 7.800 kr/mán til 10.300 kr/mán.
- **Pensjonistahjún:** úr 12.370 kr/mán til 16.970 kr/mán.

Hetta hendi serliga við hækkingunum av Samhaldsfasta og viðbótini til ávísar pensjonistar. Hetta eru tølini uttan mótrokning av aðrari munandi inntøku.

Einasta broytingin sum er hend síðani Sambandsflokkurin yvirtók hetta málsøkið, er at javningin av viðbótini er skorin niður úr 4 til 3%. Umframt at stuðulin hjá pensjonistum til heilivág er skorin munandi.

**Javnaðarflokkurin legði rygg til betri fyritíðarpensjón**

Meðan vit høvdu ábyrgdina á almanna- og heilsuøkinum, hendu stórar betringar fyri fyritíðarpensjonistar:

Lægsta fyritíðarpensjón hækkaði í 2007 og 2008 við tilsamans 2660 kr /mán.

Fyri allar fyritíðarpensjonistar varð mótrokningin av aðrari inntøku lækkað úr 60 niður í 30%.

Og fólk sum fáa tilkent fyritíðarpensjón aftaná 60 ár, fáa nú ta fullu tilkendu upphæddina, og ikki eina skerda upphædd svarandi til eitt lægri pensjónsstig, so sum tað var frammanundan.

Einasta broytingin sum er hend síðani Sambandsflokkurin fekk ábyrgdina, er at øll javningin av fyritíðarpensjónini er skorin niður úr 4 til 3%. Og haraftrat liggur eitt uppskot og lúrir um at skera alla mótrokningarfríu upphæddina hjá fyritíðarpensjonistum burtur…

**Størri hækkingar til eldraøkið enn nakrantíð**

Meðan Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina av eldraøkinum árini 2004-08 hendi størri hækkingar á eldraøkinum annars, enn nakrantíð áður:

Stuðulin til umsorgararbeiði fyri pensjonistar - tað er serliga dagtilhald og mattænasta - varð øktur úr 3,1 til 6,8 mió kr. Men tá Sambandsflokkurin fekk ábyrgdina á økinum varð stuðulin til dagtilhaldini allur skorin burtur við 4 mió kr.!

Hesi árini vóru so nógv búpláss á røktarheimum og eldrasambýlum tikin í nýtslu sum ongantíð áður – 159 nýggj pláss tilsamans – og talið av starvsfólkum í heimarøktini og eldrarøktini annars øktust samstundis við 210 fólkum! Tað sær nú eisini út til, at í hesum og í komandi ári verður eisini farið undir verkætlanir í Havn, Vági, Vestmanna og í Norðoyggjum, sum vit góvu tilsøgn til longu í 2006.

**Javnaðarflokkurin hevur púra greiða støðu í pensjónsmálinum**

Hóast tað eg havi nevnt omanfyri, so fær Javnaðarflokkurin harðar ákoyringar fyri at vilja pensjonistunum illa við ymiskum spariætlanum, sum eru framlagdar í sonevnda Ólavsøkupakkanum hjá landsstýrinum. Serliga harmist eg um lesarabrævið hjá partamanninum Jóhan Hera Joensen.

Sjálvsagt tosi eg fyrst og fremst fyri meg sjálvan. Men í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum eru vit tíbetur eisini samd um eina greiða støðu til tey mál, sum Jóhan Heri óttast fyri. Vit hava eisini lagt okkara støðu fram í sonevndu politiska fylgibólkinum, sum nú viðgerð uppskotini til nýggja pensjónsskipan.

Har eru ómetaliga nógv og víðfevnandi viðurskifti til viðgerðar, men uttan mun til sonevnda "munnkurv" um arbeiðið í fylgibólkinum, so vil eg kortini gera okkara støðu púra greiða í nøkrum av teim málum, íð stríð stendur um:

Vit taka ikki undir við at hækka pensjónsaldurin, men tey sum eru niðurslitin, skulu kunna fara frá áðrenn 67, og tey sum hava førleikan og áhugan skulu eggjast til at kunna halda fram út um 67.

Vit taka ikki undir við at mótrokna í pensjónini frá fyrstu krónu – mótrokningarfría upphæddin skal varðveitast og mótrokningin, serliga fyri lágu inntøkurnar, skal minkast munandi.

Vit vilja ikki arbeiða við uppskotinum til eina pensjónsnýskipan sum eitt spariuppskot, men sum eitt arbeiði fyri einum positivum reformi, íð skal skapa bæði verandi og komandi pensjonistum eitt trygt inntøkugrundarlag fyri eini góðari eldratilveru.

Og tað kemur ikki uppá tal at mótrokna í fyritíðarpensjónini frá fyrstu krónu – mótrokningarfría upphæddin skal varðveitast sum ein av avgjørdu fyritreytunum fyri at eisini fólk við skerdum førleika skulu kunna hava eitt virkið lív á einum meira rúmligum arbeiðsmarknað, alt eftir huga og førimuni.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.